**Nr. 68/2018**

**Jenis av Rana**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um bíðitíðir í føroyska sjúkrahúsverkinum, settur landsstýris-manninum við heilsumálum, Sirið Stenberg (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Landsstýrismaðurin verður biðin um at útgreina fyri Løgtinginum bíðitíðir í føroyska sjúkrahúsverkinum, og hvussu hesar eru, samanbornar við bíðitíðir í Danmark.
2. Ynsktar verða m.a. uppgerðir yvir bíðitíðir á:

- Ortopediska økinum
- Reumatologiska økinum
- Psykiatriska økinum
- Maga/tarm økinum
- Urologiska økinum
- Gynækologiska (kvinnusjúku) økinum
- Neurologiska økinum
- Eygna økinum

Hugsað verður um tíðina, frá at sjúklingurin verður ávístur frá kommunulækna, til hann verður móttikin á deild á sjúkrahúsinum ella hjá serlækna, og evt. viðgerð er byrjað.

**Viðmerkingar:**
Fremsta málið í heilsverkinum, tí primera og tí sekundera, er, so skjótt yvirhøvur til ber, at lyfta av sjúklinginum ta byrðu, sum sjúka ber við sær, á ein hátt, sum grøðir og veitir heilsuna aftur.

Millum størstu forðingar at náða hesum máli eru bíðitíðir. Í flestu londum finna vit hesar, tíverri í mongum førum vegna tørvandi játtanir ella starvsfólkatrot. Í báðum teimum seinnu førunum skyldast trupulleikin, hvussu vit, sum skipa fyri politiskt, raðfesta samfelagsins tilfeingi.

Sjúklingurin, og tey hesin hevur um seg, líða undir hesum, og samfelagsliga er talan um raðfesting, sum í longdini ikki gagnar búskapinum. Her hugsi eg um arbeiðsmiss, sjúkudagpengar, sosialar veitingar, familjutrupulleikar, sum sjúkratíðin lætt ber við sær, og at nýkomnu sjúkurnar, ið kundu verið grøddar við skjótari hjálp, kunnu gerast kroniskar v.m.

**Á Løgtingi, 11. juni 2019**

Jenis av Rana